

# Stuðul frá FITUR

ÍSLAND • FØROYAR

FITUR er grunnur, sum veitir stuðul innan samstarvi millum Føroyar og Ísland, ferðavinnuni at frama.
Stuðul verður veittur innan hesi øki:
Ferðavinnuútbúgving
Samskipan av ferðum - "kombinationsturisme"
Fólksligt millumlandasamstarv, sum gevur vitan innan mentan, livihátt, vinnur v.m.
Samstarv millum flutningsfeløg
Marknaðarføring innan ferðavinnu

Til dømis verður stuðul veittur til:
- Ítróttafeløg
- Skúlar og útbúgvingarstøð (kunningarferðir)
- Vinnufeløg
- Mentunarfeløg
- Kommunal samstarvsfeløg
- Vinarbýir
- Hátíðarhald



Umsóknir skulu stílast á donskum ella enskum og sendast til:

**FITUR**
**c/o Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**FO-110 Tórshavn**

ella

**FITUR**
**c/o Ferðamálaráð Íslands**
**Lækjargata 3**
**IS-101 Reykjavík, Ísland**

*Umsóknarbløð fáast frá Ferðaráð Føroya og Ferðamálaráð Íslands.*
*Seinasta freist at søkja er 1. mars 2001*

*Í nevndini sita Petur Olivar í Hoyvík, nevndarformaður í Ferðaráð Føroya, Marita Danielsen, Flogfelag Føroya, Magni Arge, Atlantic Airways, Arnbjørg Sveinsdóttir, Steinn Lárusson, Icelandair og Gunnar Sigurdsson.*

## Føroya Studentaskúli og HF-skeið

**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
**Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624**

Lýst verður eftir tímalærara í lívfrøði (uml. 14 løntímar/viku) frá 1. mars 2001 til 1. juli 2001.

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsøkjarar uttan endaligt prógv kunnu eisini søkja.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi 29. jan. 2001.

## Starv á fiskrannsóknarstovuni

Søkt verður eftir fólki at arbeiða 3/4 dag. Starvið er at gera fyrireikingar, so at aldurin á fiski kann gerast av. Serliga er uppgávan at arbeiða við nytrum, so sum stoyping, upplegging og saging.

Eingi krøv verða sett um útbúgvningar o.t., men til starvið krevst nærlagni og neyvleiki.

Starvið verður lønt í 8. flokki í sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 315092.
Skrivlig umsókn má vera inni í seinasta lagi 5. februar 2001.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
Postsmoga 3051
110 Tórshavn

## Servitrisa M/K

Søkt verður eftir servitrisu M/K til okkara matstovu skjótast gjørligt.

**Marco Polo**
**tlf. 313430**
**ella 213430**

MARCO POLO

## SUBARU 4.WD við skaða

**Ein sera vælhildin Subaru 1.8 GL Sedan, 4. hjólstrekk, reyður, 260.000 km., árg. jan. '89 við skaða til sølu.**

D. B. Bilar

Tel. 310 600

## Ferðastuðul til lesandi uttanlands

Tey, sum byrjaðu lesturin í heysthálvuni, kunnu søkja um ferðastuðul nú. Umsóknarfreistin fyri hesi er 31.07.2001.

Tey, sum byrjaðu lesturin í várhálvuni kunnu ikki søkja um ferðastuðul fyrrenn í august-/september mánaða 2001, og er endaliga umsóknarfreistin fyri hesi 31.12.2001

Umsóknarblað, vegleiðing v.m. til ferðastuðulin lestrarárið 2000/2001 kunnu nú fáast við at prenta hesi frá heimasíðu okkara www.studulsstovnurin.fo ella við at venda sær til stovnin.

Stuðulsstovnurin

Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 3279
FO-110 Tórshavn
telefon 319680 – faks 355055



Toll- og Skattstova Føroya

## STARV
## á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur:** Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt, toll, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv:** Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika, og skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar, og teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða** eitt spennandi starv við møguleikum fyri eftirútbúgving,
- klokkuskipan við flextíð, og
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir:** Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið** fáast við at seta seg í samband við Ingolf Lamhauge, økisstjóra, tlf. 448588.

**Umsóknir:** Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, Postboks 225, 600 Saltangará **innan 05. februar 2001.**

**Um stovnin:** Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, íð eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 18 fólk.

## KUNNGERÐ

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya, verður í Útvarpshøllini, Tórshavn, **leygardagin 17. februar 2001, kl. 10.00** og ikki sum áður lýst í Norðurlandahúsinum 3. mars 2001, kl. 10.00.

Fundarskrá sambært lógunum.

**Fótbóltssamband Føroya**

Søkt verður eftir

## NÆMINGI

**Til deildir okkara í Vágoy**

***Vilt tú hava eina áhugaverda og fjølbroytta útbúgving?***

- Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú júst eina tílíka innan peningastovns- og viðskiftafólkstænastu, somuleiðis sum tú skalt ganga í peningastovnsskúla.
Næmingatíðin er 2 ár.

**Útbúgvingarkrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HT-, HF- ella tilsvarandi prógv.

**Umsóknin**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. januar 2001 kl.16.00

Er áhugi fyri fleiri upplýsingum, kanst tú seta teg í samband við Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, tlf. 348000.

Upplýsingar um virksemi hjá Føroya Sparikassa eru á heimasíðuni: www.sparikassin.fo

Hevur tú áhuga fyri hesum, ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við avriti av próvskjølum til:

**Føroya Sparikassi**
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn

## Eykaaðalfundur/ Aðalfundur í Føroya Pedagogfelag

Eykaaðalfundur verður á Hotel Føroyum

**leygardagin 24. februar 2001 kl. 14.00.**

**Skrá:** Roknskapur til góðkenningar. Samstundis verður boðað frá, at ársaðalfundur felagsins verður hildin á sama stað

**leygardagin 24. februar 2001 kl. 15.30.**

**Skrá:** Smb. viðtøkum felagsins.

Uppskot til aðalfundin skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 3. febr. 2001.

**Nevndin**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Felagsinnskriving í
### Tórshavnar kommunalu skúlar skúlárið 2001/2002

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 1995 í **1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum ella Hoyvíkar skúla** næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum 29. ella 30. januar 2001.

**Innskrivingin**
Innskrivingin í allar skúlarnar er í býráðssalinum **mánadagin 29. og týsdagin 30. januar, báðar dagarnar frá kl. 3-6 seinnapartin. Havið dóps/navnabræv við.**

Skúlaráðið skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísar skúlar í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúlar, har pláss er.

**Eisini ber til at ringja**
Møguleiki er eisini at ringja í býráðssalin somu tíð tlf. 31 71 60.

**Skúlaumbøn**
Tað ber til at biðja um at fáa barn/børn í ein av skúlunum. Skúlaráðið fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. flokk.

**Argja skúli**
Næmingarnir á Argjum fara í skúla kl. 11.40, men kunnu fara í Frítíðarskúlan fyrrapart.

**Kollafjarðar skúli**
Innskriving í Kollafjarðar skúla er í skúlanum **mánadagin 29. januar, frá kl. 3-5 seinnapartin.**

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum ella á tlf. 31 78 45.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, verða **ikki** innskrivað í býráðssalinum, men umsóknarbløð til Frítíðarskúlan fáast í býráðssalinum, heimasíðu kommununnar (www.torshavn.fo), í Snarskivuni ella á tlf. 31 51 60.

**Meira fæst at vita**
Meir fæst at vita um innskrivingina í skúlanum ella hjá Tórshavnar skúlaráði, Jákupi Simonsen, skrivara, tlf. 31 51 60.

**Tórshavnar skúlaráð og Kollafjarðar skúlanevnd**

SNARSKIVAN